Føroya Sparikassi:

Sparipeningurin øktist við 68 mill. kr.

Útlánini øktust við 43 mill. kr. Tey eru 462 mill. kr., meðan 535 mill. kr. standa á bók



Høvuðsdeildin hjá Føroya Sparikassa í Sverrisgøtu í Havn. Tekning eftir I. av Reyni

Seinasta roknskaparárið hjá Føroya Sparikassa, sum gongur frá 1. apríl til 31. mars, var gott. Hetta vísir 149. roknskapurin hjá Sparikassanum, sum varð sendur út fyri stuttum.

Roknskapurin javnvigar við 644,3 mill. kr. afturímóti 553,9 mill. kr. undanfarna roknskaparár, soleiðis at økingin er 90,4 mill. kr.

Samlaðu inntøkurnar eru sambært rakstrarroknskapinum 78,9 mill. kr. Størsta inntøkan eru renturnar frá útláninum. Tær eru 53,8 mill. kr. afturímóti 39,0 mill. kr. undanfarna roknskaparár. Aðrar inntøkur stava frá rentum av innlánum í bankum og sparikassum, 6,1 mill. kr., rentum av virðisbrøvum og vinningi av partabrøvum, 10,0 mill. kr., og harafturat koma nakrir smærri inntøkupostar.

Yvirskot: 17,95 mill. kr.

Størsta útreiðslan eru renturnar til spararanar. Tær eru 44,3 mill. kr. afturímóti 31,5 mill. kr. undanfarna roknskaparár. Kostnaður er 10,85 mill. kr. Harafturat koma nakrir smærri útreiðslupostar, soleiðis at samlaðu útreiðslurnar eru 60,9 mill. kr. Inntøkurnar vóru 78,53 mill. kr. Sostatt verður yvirskotið 17,95 mill. kr.

Meginparturin av yvirskotinum, ella 16,0 mill. kr., verður settur í ein tiltaksgrunn, meðan 279.241 kr. fara í ein gávugrunn, 174.645 kr. í kursjavningargrunnin, 1,0 mill. kr. á konto móti ognartapi og 500.000 kr. fara í eftirlønar- og hjálpargrunnin.

Innlánini vaksin meira enn útlánini

Figgjarstøðan hjá Sparikassanum vísir, at samlaðu útlánini eru 462,4 mill. kr. Frá undanfarna roknskaparárið eru útlánini økt við 42,966 mill. kr. Í prosentum er talan um ein vøkstur upp á 10,24 prosent.

Sparipeningurin var við endan av figgjarárinum 535,719. Undanfarna ár var hann 468,824 mill. kr. Sparipeningurin er øktur við 67.933 mill. kr. frá árinum fyri. (Tá er ein lítil upphædd, knappar 4 mill. kr., sum er innlán frá bankum og sparikassum íroknað). Í prosentum er sparipeningurin øktur við 14.40 prosentum.

Hyggja vit eftir sparipeninginum, stendur tann størsti parturin á bók við uppsøgn, nevniliga 394.496 mill. kr. Á vanligari bók standa 128,642 mill. kr., meðan 12,580 mill. kr. stóðu á kekkkonto.

Annars vísir figgjarstøðan m. a., at í tiltaksgrunninum eru 80,4 mill. kr. og í kursútjavningargrunninum eru 14,0 mill. kr.

Eginpeningurin hjá Føroya Sparikassa er nú 104,4 mill. kr. Hetta svarar til 19,34 prosent av ábyrgdunum hjá Sparikassanum.

Stórur vøkstur

Aftast í ársroknskapinum eru nøkur hagtøl. Í teimum sæst m. a., at talið av lánveitingum í seinasta roknskaparárið var 1772. Sparikassin lánti 100,341 mill. kr., meðan 57,375 mill. kr. vórðu afturgoldnar. Samlaða talið av lánum hjá sparikassanum 31. mars í ár var 8750 afturímóti 8389 árið fyri.

Eisini vísir yvirlitið, at seinastu 10 árini er upphæddin á innlánunum økt við 419,1 mill. kr. Hetta eru 347,8 prosent.

Hinvegin er upphæddin á útlánunum økt við 360 mill. kr., sum svarar til 351,9 prosent.

Samlaða talið av konti í Sparikassanum er 43.626. 4227 nýggjar konti vórðu skrásettar seinasta roknskaparár.

Nýggjar deildir

Tríggjar nýggjar deildir eru stovnaðar seinasta árið. Tvær í Havn, á Tinghúsvegnum og við J. C. Svabosgøtu, og ein í Húsavík, soleiðis at samlaða talið av deildum er 21.

Deildin í Sørvági er flutt í nýggjan bygning, meðan deildin í Fuglafirði er flutt í nýggj høli. Í frágreiðingini verður annars sagt, at í Sandavági flytir Sparikassin skjótt í nýggj høli og at deildin í Vestmanna skal umbyggjast.

Sparikassin er eins og bankarnir farin til »on-line«-avgreiðslu og seinasta árið er hendan skipanin tikin í brúk í Rúnavík og í nýggju deildunum í Havn. Ætlanin er í ár at fara til »on-line« á Tvøroyri, Sandi, Vestmanna og í Miðvági.

Stjórar í Føroya Sparikassa eru Johan K. Joensen og Knút E. Háberg. Í umsjónarráðnum sita: Leivur Lützen, Kristian Jensen, O. Áarberg, Carl Th. Sørensen, Bjarni Joensen, Carl J. Petersen og Dia P. Johannesen.



Týsdagin lat eitt nýtt galleri upp í Havn, Galleri Lovo. Og samstundis lat ein listarframsýning við Ingálvi av Reyni upp.

Galleríið liggur á Hoydalsvegnum 8. Inngongin er hin sama sum til blómuhandilin.

Á framsýningini hjá Ingálvi, sum partvíst er afturlítandi, eru 47 verk. Við undantak av tveimum málningum eru alt teknингar. Nógvar teirra eru teknaðar fyri fleiri árum síðani — heilt aftur til um 1950.

Framsýningin við Ingálvi er opin til 21. august. Dagliga er opið 10 til 17,30. Leygardag frá 9 til 13.

Tvøroyrar býráð:

Misnøgt við at SEV byggir el-verkið í Vági

Ivan Johannesen, formaður í SEV-stýrinum: Dugi ikki at siggja grund til at taka málið uppaftur

Tvøroyrar býráð hevur ynskt at fáa eina frágreiðing um avgerðina hjá SEV-stýrinum um at byggja tað ætlaða elverkið á Oyrunum í Vági. Í hesum samband bjóðaði býráðið á Tvøroyri stýrinum fyri SEV til ein fund á Tvøroyri týsdagin.

Næstformaðurin í býráðnum, Dánjal av Rana, upplýsir, at partarnir løgdu fram síni sjónarmið, og SEV-stýrið kom við eini grundgeving, hví stýrið hevur valt Vág.

— Vit meta, at tað er eingin orsøk at flyta elverkið, og vit vístu á, at upprunaliga var tað Tvøroyrar kommuna, sum lat verkið byggja í 1947. Seinri løgdu vit saman við Vág um Elfelagið Suðuroy og seinri fóru vit upp í SEV, men vit hava ongantíð sum soleiðis latið verkið frá okkum, sigur Dánjal av Rana.

Hann vísir eisini á, at framferðin hjá SEV-stýrinum var ógvuliga løgin. Tvøroyrar kommuna hevði samband við SEV um útbyggingina, bæði fundog brævsamband, men Tvøroyrar býráð frætti einki aftur, fyrrenn tað stóð í bløðunum, at el-verkið skuldi byggjast í Vági.

Tað var í juni 1980, at SEV hevði fund saman við býráðnum og heilsunevndini á Tvøroyri um eina møguliga bygging og í brævi frá Tvøroyrar kommunu til SEV í nov. í fjør bjóðar býráðið SEV øki burturav idnaðarøkinum á Drelnesi.

Í januar svarar SEV, at gjølligar kanningar vístu, at verkið annaðhvørt kundi setast á Drelnesi ella innanfyri Hellá. Í samband við Drelnes vísir SEV á, at neyðugt er, at gera grótkast frá bryggjuni og inn til land. Við Hellá er eisini neyðugt at gera grótkast soleiðis at skip kann leggja motorarnar upp. Í samband við møguleikan við Hellá, har bústaðarøki er lagt omanfyri vegin, nevnir SEV eisini góðan møguleika at veita fjarhita. Annars biður SEV Tvøroyrar býráð um uppbakking, um avgjørt verður at leggja el-verkið har.

Viðvíkjandi styrkjan av bryggjuni á Drelnesi sigur Dánjal av Rana, at har er kommunan í ferð við at betra bryggjuna.

Formaðurin í SEV-stýrinum, Ivan Johannesen, løgtingsmaður, sigur, at stýrið tók avgerð grundað á kanningar, sum vístu, at tvey støð vóru egnað í Suðuroy — á Drelnesi ella á Oyrunum. Ein meiriluti valdi seinri loysnina.

— Kann tað hugsast, at málið verður tikið uppaftur?

— Tað dugi eg ikki at siggja nakra grund til, og tað er heldur ikki komið nakað ynski um at taka málið uppaftur.

Ivan Johannesen vísir tó á, at møguleiki er sambært lógunum hjá SEV at taka mál til nýggja viðgerð á umboðsráðsfundi.